# »Forman klippir ein klassikara!«



Tað eru fleiri filmar, ið ein rættiliga skjótt bara gloymir. Men tó, filmarnar hjá Milo Forman er eitt sindur truplari at gloyma. Leikstjórin, ið varð føddur í fyrrverandi Kekkoslavakínum 18. februar 1932, misti bæði foreldrini í arbeiðslegunum hjá nasistunum og flutti úr Prag til USA um várið í 1968. Sjey ár seinni bleiv hann kendur víða um við filminum "One Flew Over the Cuckoo´s Nest" ella "Geykareiðrið", við Jack Nicholson í høvuðsleiklutinum. Filmurin vann fimm tær størstu virðislønirnar á Oskar Handanini og var at síggja í biografum umkring í heiminum í fleiri ár.

Milos Forman er gestur í dokumentarrøðini Kendir Instruktørar í januar mánaðinum, har eisini Tony Scott, ið m.a. er kendur frá filmum sum "Top Gun", "True Romance", "Enemy of the State" og "Spygame", vitjar. Av øðrum filmum hjá Milos Forman kunnu nevnast "Hair" (1979), "Ragtime" (1981), "Valmont" (1989), "Fólkið móti Larry Flynt" ella "The People vs. Larry Flint" (1996) og "Man on the Moon" (1999).

Filmurin við Milos Forman á Canal+ er "Amadeus: Director´s Cut", ein serútgáva, sum hevði frumframførslu á Canal+ 1. januar. Tann fyrsta veruliga frumframførslan hjá hesum filminum var í 1984 og vann átta Oskar-virðislønir tað filmsárið. Tom Hulce og F. Murray Abraham gjørdust líka so kendir sum undurbarnið úr Salsburg.
Nú er so Forman aftur við eini serútgávu av meistara verkið sínum. Hetta vil siga, at heilir 20 minuttir við spenningi, tónleiki og ljóði eru lagdir afturat útgávuni frá 1984.

**Fakta**

**Oskar-virðislønir 1985 fyri:**

-Best Picture
-Best Director
-Best Actor, F. Murray Abraham
-Best Screenplay Adaptation, Peter Shaffer
-Best Art Direction
-Best Costume Design
-Best Make-up
-Best Sound

**Amadeus: Director´s Cut - á Mikudag 21. kl. 19.00**



